

*Myndir sýnir grindamenn, sum leygardagin stovnaðu felag. Mynd: Jens Chr. Vang*

*Felagið Grindamenn:*

# Vilja hava síni sjónarmið fram

*–Tað hevði eisini verið gott at grindamenn luttóku, eitt nú á Namco fundum saman við øðrum veiðimonnum, sigur Kate Sanderson, stigtakari til felagið*

Seinasta leygardag hittust einir 40 grindamenn úr øllum landinum í Norðurlandahúsinum. Endamálið við fundinum var eitt stovna eitt felag, sum skuldi bera fram sjónarmiðini hjá monnunum, sum reka grind, sum eru í drápinum og sum skera á háls ella nú svæva. Sjónarmiðini hjá hesum monnum hava ikki verið hoyrd nóg væl, eisini tá hugsað verður um altjóða fundir um hvalaveiðu.

– Higartil hevur tað verið soleiðis, at landsstýrið umboðar øll í Føroyum, men tað hevði verið gott um onkur grindamaður var við á hvalaveiðufundunum. Hann hevði kunnað greitt frá sjónarmiðunum hjá grindamonnunum. Higartil hevur tað verið soleiðis, at embætismenn, sum neyvan nakrantíð hava drípið ein hval umboða Føroyar og skulu greiða frá sjónarmiðunum hjá grindamonnunum, sigur Kate Sanderson, sum er stigtakari til nýggja felagið.

–Eg haldi, tað hevur stóran týdning, at føroyskir grindamenn hitta veiðumenn úr øðrum londum, eitt nú Grønlandi, Íslandi og Noregi. Teir hava nakað til felags og kunnu læra av hvørjum øðrum, sigur hon.

–Grindafelagið skal virka báðar vegir, tað skal greiða frá sjónarmiðunum hjá grindamonnunum úteftir og tað skal eisini skipa fyri tiltøkum, sum kunnu vera grindamonnum til fyrimuns. Eitt nú kann hugsast at halda skeið í grindadrápi og grindarakstri, sigur Kate Sanderson.

Felagið er skipað soleiðis, at umboð fyri hvørja hvalvág hava atkvøðurætt á aðalfundinum. Limirnir í hvørjum grindaøkinum velja sítt umboð.



*Kate Sanderson var stigtakari til fundir Mynd Jens Chr Vang*

Fundurin valdi eina trýmannanevnd. Í henni sita Ólavur Sjúrðaberg úr Leirvík, Jógvan Ósá, sýslumaður á Sandi og Hans Jacob Hermanssen.

Eykalimir eru Jón Joensen úr Bø, Finnbogi Joensen úr Vestmanna og Hanus Joensen úr Hvalvík.

**justinus**

*Føroya Oljuídnaður:*

# Limirnir streyma í felagið

*Í dag eru 25 virkir og 50 einstaklingar skrásettir sum limir í áhugafelagnum Føroya Oljuídnaður*



Í Hetlandi er eitt felag sum ikki slepst uttanum tá tosað verður um oljuvinnu. Tað er Shetland Oil Industries Group, sum er eitt áhugafelag og øll virkir og feløg sum hava nakað við oljuvinnuna at gera eru limir í hesum felag. Hetta er eitt felag sum savnar innlendskt og útlendsk sambond saman.

Føroyingar hava tikið stig til at stovna eitt líknandi felag og tað er lítil ivi um, at góða úrslitið hjá hetlendska felagnum hevur skundað undan. Hetlendska felagið hevur ótrúliga stóran týdning fyri hetlendingar.

Fyribilsnevndin í Føroya Oljuídnaði er nú víðkað við tveimum limum. Gunnar Mohr frá Tórshavnar Skipasmiðju er komin í nevndina og Jóhanna Hansen, skrivari hjá Maskinmeistarafelagnum. Frammanundan sita Jóhan Mortensen, Alva Nielsen og Magni Arge í nevndini.

Felagið hevur fingið so mikið góða undirtøku, at øll grund er at halda fram við arbeiðinum, sigur nevndin.

### Útlendingar hava áhuga

Áhugin hjá altjóða olju og seismiskum feløgum er vaksandi fyri virksemi á føroysku økinum. Føroya Oljuídnaður hevur havt samband við tey týdningarmestu av hesum feløgum og skilja hesi, at ein av treytunum fyri at virka á føroyskum øki er at føroyingar verða settir í starv og at føroyskt vinnulív luttekur.

Felagið vónar, at landstýrið fer at geva feløgum loyvi at byrja seismiskar kanningar longu í august og tá er fyrsta stigið tikið til eina møguliga off shore vinnu í Føroyum.

**justinus**

### 75 ár

Friggjadagin tann 25. juni fyllir Lana Arge, V. U. Hammershaimbsgøtu 8, Tórshavn, 75 ár.

Føðingardagurin verður hildin hjá Toru Dahl Sandberg, Sionsgade 5 c, 2100 Kbh. Ø